

## Jógvan Isaksen fyrilestur í Berlin

Føroyskar bókmentir seinastu 100 árini verður evni í fyrilestri, sum føroyski rithøvundurin og bókmentafrøðingurin Jógvan Isaksen fer at halda á Humboldt Universitetinum í Berlin 7. mai. Í fyrilestrinum fer Jógvan Isaksen at viðgera tey mest týðandi skeiðini í føroysku bókmentasøguni seinastu 100 árini. Eisini fer hann at lýsa trupla sambandið millum danska og føroyska málið í føroyskum bókmentum, sum tað endurspeglar Føroyar sum post kolonialt samfelag. Fyrilesturin, ið er á donskum, verður hósdagin 7. mai klokkan 18.00 á Nordeuropa-Instituttinum á Humboldt Universitetinum í Berlin, høli 3.134 (Georg Brandes)




*Ráðgeving fyri føroyingar í Danmark er í Føroyahúsinum, sum liggur mitt í Keypmannahavn á Vesterbrogade 17A. Har ber til at fáa dulnevnda hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum trupuleikum, og lestrar-málum.*
*Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30 - 15.30.*
*Mikudag kl. 14.00 - 18.00.*
*www.radgevingin.dk*

# Takksemi

**- Fólk eru ótrúliga takksom fyri, at tey kunnu fáa ráðgeving á føroyskum. Vit skilja og tosa føroyska málið, vit vita hvagani tey eru, og vit kenna føroysku mentanina. Tað lættir nógv um, greiðir Ruth Dal-Christiansen frá. Saman við Randi Johannesen hevur hon verið á Ráðgevingini í 25 ár**

RÁÐGEVINGIN
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

Í lítlu skrivstovuni við gamla, avpussaða trægólvinum standa tvey skriviborð mitt í rúminum. Har sita Randi og Ruth og hjálpa føroyingum, sum eru vilstir í donsku lógunum. Soleiðis hava tær sitið seinastu 25 árini og tosað tvørturum skriviborðini. Í eina fjórðings øld hava hesar báðar kvinnurnar ráðgivið føroyingum í lestrarørinum, í sjúkraørindum og føroyingum, sum arbeiða og búgva í Danmark.

Tær hava bygt Ráðgevingina upp frá grundini, og arbeiða stútt við at halda sama høga tænastustøðið, sum tær eru so kendar fyri at veita.

### Byrjaði sum ein roynd

-Eg var formaður í nevndini Ráðgevingina fyri 25 árum síðani, so tað var eg, sum setti Randi í starv, sigur Ruth smílandi.

Tá var talan um eina roynd í tvey ár, fyri at vita, um tørvur var á eini føroyskari ráðgeving í Danmark. Skjótt staðfestu tær, at tørvurin var ovurhonds stórur. Nú 25 ár eftir er hann tað framvegis.

Hóast Ráðgevingin nú verður 25 ár, so hava Ruth og Randi arbeitt við Ráðgevingini enn longri av tí, at tær eisini vóru við í fyrireikandi nevndini. Randi byrjaði í 1981 og Ruth í 1982. Tær hava sostatt báðar verið við síðani byrjanina.

Komandi hósdag verður stórt hátíðarhald í Føroyahúsinum, tí tá eru 25 ár liðin, síðani Randi varð sett í fast starv, og sama dag verður Ráðgevingin 25 ár.

- Vit fara ordiliga at feiðra dagin. Tað verða talur, matur og drekka. Øll eru hjartaliga vælkomin, so vit ána ikki hvussu nógv fólk munnu fara at koma, sigur Ruth.

Men tær vita tó, at Hans Pauli Strøm kemur. Hann var einaferð leiðari av føroysku hølunum í Rosenborggade, so tað er nokkso stuttligt, at hann nú kemur aftur sum ráðharri at hátíðarhalda stóra dagin.

### Frá skrivimaskinu til e-mail

Tankarnir leita 25 ár aftur í tíðina, til tá tær byrjaðu.

- Ja, tað var ikki tað sama. Tá høvdu vit ein metur av ringbindum á hyllini, sum vóru full av lógum. Tá máttu vit sjálvar ganga regluliga ígjøgnum øll ringbindini, fyri at ajourføra lógirnar við hond. Nú er alt elektroniskt, og vit kunnu sláa lógirnar upp á netinum, visir Randi á.

Ruth leggur afturat, at tá man fór yvir til at brúka e-mail broyttist arbeiðið eisini heilt nógv.

- Fyrr sótu vit her og skrivaðu øll brøvini á maskin. Síðani skuldu tey í brævbjálvar, frankerast og so í postkassan. Av tí sama bleiv tað meiri formelt og langdrigið, tað heila. Nú kann man maila aftur og fram fleiri ferðir sama dag. So e-mailurin hevur broytt nógv og stytt um tíðina, sum sakirnar taka.

Tær eru tó samdar um, at hóast tær nýta e-mailin nógv hvønn einasta dag, so skriva tær enn í sama formella stíli, sum um tær sótu við skrivimaskinuna.

- Eg dugi ikki at sleppa tí. Tey ungu senda púra óformellar mailar, sum var tað ein samrøða. Tað dugi eg ikki ordiliga við, sigur Ruth.